Føroya Fuglafrøðifelag Postsmoga 1230 110 Tórshavn

# VEINGJAsuð

Til øll við áhuga fyri føroysku náttúruni

Árgangur 1 **Nr. 1 2009** kr. 49



## Nøvn til føroyskar skinfluguslektir og -sløg

Síða 8

## Ørkymlandi gongd

hjá sjófuglinum í Norðurhøvum

Síða 22

# Sjáldsamir fuglar

í Føroyum 2005 og 2006

Síða 17

BirdLife INTERNATIONAL AFFILIATE



# Vit verða hildin fyri gjøldur

Viljin er heilt einfalt ikki til staðar. Politikarar vilja sera fegnir tosa um okkara vøkru náttúru, og enntá um at verja hana, Men tá tað kemur til skarpskeringar, tá verður einki gjørt.

Almennu Føroyar hava í fleiri ár arbeitt við nógvum ætlanum á náttúruøkinum. Nevnast kann, at í 2003 varð farið í holt við eina nýggja náttúruverndarlóg, í 2006 varð ein Visjón 2015-bólkur settur av einans til umhvørvið, og sama ár samtykti Løgtingið at seta 1 mió. kr. av til at skráseta lívfrøðiliga margfeldið. Best av øllum, so hevur Landsstýrið eina ætlan um, at í 2010 – um eitt ár – skal neiliga gongdin hjá lívfrøðiliga margfeldinum verða steðgað.

Aftrat hesum ítøkiligu ætlanum hava allir politiskir flokkar víst á týdningin av at verja okkara náttúru.

Hvør er so støðan hjá føroysku náttúruni?

Almennar byggiætlanir verða gjørdar sum ongantíð fyrr, men hava vit nakrantíð hoyrt, at ein tílík ætlan er steðgað, tí náttúran skal verjast?

Afturgongdin hjá sjófuglinum er staðfest, men einki verður gjørt fyri at kanna støðuna hjá øðrum fuglum. Einki verður gjørt við beinleiðis hóttanir, t.d. at tamdúgvur blandast uppí bládúgvustovnin ella vandan fyri, at rotta kemur í drunnhvítabølið í Nólsoy. Ein týðandi partur av heimsins skúgvum eiga í Føroyum. Og her kann tann, sum vil, stilla seg í eitt skúvsbøli við byrsu og skjóta, til allir eru deyðir – vaksnir, eins væl og ungar og egg. Og skuldi tað hent seg, at ein sjáldsamur brand- ella ternumási kemur hendan vegin, so kann hann eisini skjótast.

Ein frágreiðing hjá Landsstýrinum frá 2001 gjørdi greitt, at hvørki lógin um náttúrufriðing ella friðingarnevndirnar kundu brúkast. Tó, Landsstýrið hevur avgjørt ikki at broyta nakað, og nú, í byrjanini á 2009, noyðast vit at staðfesta, at náttúran ikki verður vard eitt vet betur, og støðan hjá náttúruni er versnað.

Tá støðan ikki er vorðin frægari, hvat so við teimum ætlanunum, sum tað almenna hevur lagt?

Náttúruverndarlógin hevði nokk gjørt ein mun, men nú á sætta ári er hon framvegis ikki at hóma.

Landsstýrið ætlar, sum sagt, at afturgongdin av lívfrøðiligum margfeldi skal verða steðgað í 2010. Hetta er so veruleikafjart, at tú kanst bara yppa øksl. Tað er neyvan nøkur orsøk at halda, at 2015-ætlanin fær nakra aðra lagnu.

Syndarliga niðurstøðan er, at so gott sum allar almennar ætlanir um at gera nakað gott fyri náttúruna verða til einkis. Sjálvt tann eina milliónin, sum eitt nærum einmælt Løgting játtaði at seta av til lívfrøðiligt margfeldi, hvarv ein mánað seinni í fíggjarlógarviðgerðini.

Mín áheitan á okkara politikarar og almennu umsiting er ikki at fara rennandi til fjølmiðlarnar, so skjótt ein ætlan er løgd. Bíðið til úrslitið er á borðinum.

Hóast tað neyvan kemur meira burturúr, so sleppur Føroya fólk, um ikki annað, undan at verða hildið fyri gjøldur.

*Tórshavn, trettandakvøld*
*Janus Hansen*

**Føroya Fuglafrøðifelag**
- landsfelag fyri fuglakannan og fuglavernd - hevur sum endamál at fremja kannan og vernd av landsins fuglalívi og at birta og halda uppi almannaáhuga fyri fuglasløgum og fuglaumhvørvi.

**Nevnd:**
*Formaður* Janus Hansen
*Næstformaður* Jóan Petur Petersen
*Skrivari* Hildur Nielsen
Svenn Justinusen
William Simonsen
Eykalimir Leif Petersen
Andrea Midjord

**Samband:**
*Teldupostur* ffff@kallnet.fo
*Telefon* +298 225933 (Janus)
*Postur* Postboks 1230
FO-110 Tórshavn

**Limagjald:**
150 kr. fyri einstaklingar og 200 kr. fyri húsarhald.
Limagjald verður goldið í aprílmánaða.
**Konto nr.:** 9181 123-392.2
**Swift:** EIKB FOTF
**IBAN:** FO76 9181 0001 2339 22

**Stuðlar:**
Rasmussen & Weihe, Eik gávugrunnurin, Grón, Demich, Tvøroyrar kommuna, Vágs Kommuna, Skúvoyar kommuna, Vestmanna kommuna, Runavíkar kommuna, Porkeris bygdarráð, Fuglafjarðar kommuna, Nes Kommuna og Viðareiðis kommuna

*Ritstjóri:*
Janus Hansen

*Permumynd:*
Silas K. K. Olofson

*Sniðgeving og grafisk framleiðsla:*
Petur E. Ellefsen

*Prent:*
Føroya Prent

ISSN 1903-6930



## Permumyndin

Ein kúhegri (*Bubulcus ibis*) var at síggja á Viðareiði nakrar dagar síðst í september í 2008. Hetta er fyrstu ferð, at kúhegri er skrásettur í Føroyum.

Kúhegri er ein lítil hegri, bert eitt sindur størri enn spógvi. Hann eigur vanliga í Suðurevropa, Asia og Afrika og hevur síðani 1930-árini eisini fest búgv í Amerika. Um fuglurin á Viðareiði er komin úr Evropa ella Norðuramerika er ilt at meta um.



# Í Føroyum er góður møguleiki at síggja nógv sløg av másum.

”

Silas K.K. Olofson

Nógv er broytt seinastu øldina, tá tað kemur til tað at hyggja eftur fuglum. Tá vit nú á døgum hava vitan um sjáldsamar fuglar, sum vóru sæddir á okkara leiðum fyri meira enn hundrað árum síðani, so er hetta al oftast orsaka av, at fuglurin varð skotin. Tá hevði ein ikki kikarar sum í dag, og fuglarnir máttu tí skjótast, um teir skuldu kannast nærri.

Hesin hugburður hevur broytt seg munandi í nýggari tíð. Kikarar og teleskop eru komin á marknaðin og tí ber til at granska fuglin í náttúruni í nógv betri mun enn fyrr. Sjálvur byrjaði eg at hyggja eftir fuglum sum smádrongur í Fuglafirði. Mín fyrsti kikari var ein 7 x 35. Serliga góður var hann ikki, men eg sá so fuglarnar betri enn við ongum kikara. Eg átti eisini bókina "Fuglar í Norðurhøvum", sum eg brúkti nógv. Men sum áhugin vaks, so var hetta ikki ordiliga gott nokk og eg havi síðani slitið fýra kikarar og tvey teleskop upp, næstan.

Samskiftið millum fuglaáhugaði er eisini vorðið nógv betri seinastu árini, og serliga aftan á at internetið er komið fram. Eg minnist serstakliga, at eg fleiri mánaðir ov seint fann útav, at ein brandmási hevði verið at sæð í Vestmanna í mars 1996 í meir enn eina viku. Bert ein tíma í bili frá Fuglafirði. Hetta er munandi broytt nú, hvar vit hava fingið heimasíðuna www.faroenature.net umframt fartelefonir og sms. Hetta er serliga ein stór hjálp, um ein er í iva um, hvønn fugl ein hevur sæð, men ger tað samstundis eisini munandi lættari hjá øðrum at síggja fuglarnar.

Áhugin fyri at hyggja eftir fuglum er í stórum vøkstri i Vestureuropa. Tó eru tað nógvir ymsir mátar at hyggja uppá. Summi dáma best at eygleiða eitt øki, t.d. eitt vatn ella eina viðarlund nærum hvønn dag og fylgja við í, hvørjir fuglar koma og fara. Aðrir dáma best ein ávísan fuglabólk, so sum másar, ternur ella ljómarar. Upp aftur onnur ganga høgt uppí at síggja so nógvar ymiskar fuglar í einum landi sum gjørligt og ferðast ofta langa leið fyri at síggja ein ávísan fugl. Ongin máti er betri enn annar, men allir mátar hjálpa okkum til at fáa meiri vitan um fuglin sum heild.

Í Føroyum er tað t.d. góður møguleiki at síggja nógv sløg av másum. Tað tekur langa tíð og krevur nógvar tímar úti við kikara, áðrenn ein lærir at greina bara tey vanligu sløgini sum likku, fiskimása, skatumása og svartbak. Men hevur ein fyrst givið sær tíð at læra hesar at kenna, so kann ein vera heppin at finna stóran og lítlan valmása og enntá kumliens mása, sum er eitt undirslag av lítlum valmása, og sæðingar frá Norðuramerika. Í 2009 hava nógvir stórir og lítlir valmásar verið at sæð, og eisini tveir kumliens másar eru eygleittir í Skopun. Har afturat koma fleiri sløg av másum í fransaternufamiljuni, sum javnan eru at síggja í Íslandi og Hetlandi, og tískil kundu væntast at gista í Føroyum eisini.

Inn ímillum koma innrásir af ymsum fuglum til Norðuratlantshavið. Av meira vanligum fuglum kunnu nevnast reyðstapi, krossnev og prýðisígða, sum summi ár eru fleiri í tali og summi ár als ikki eru at síggja. Mær dámar væl at fylgja við í, hvørjir fuglar vera sæddir í Norðanlondum og Hetlandi, tí hetta kann geva eina ábending um, hvat ein kundi verið heppin at funnið í Føroyum. Í 2002 var m.a. innrás í Svøríki, Norra, Danmark og í Hetlandi av vongblikutum krossnevum. Tískil fór eg runt í viðarlundunum nærhendis fyri at vita, um nakað vongblikut krossnev var at síggja, og mín sann so vóru fleiri at síggja millum vanlig krossnev í viðarlundini í Kunoy. Tað er sjálvandi verri enn so altíð, at tað eydnast, men stuttligt er tað, tá tað hendir. Tó er tað ikki bert innrás-fuglar, sum ein skal hyggja eftir. Um fólk í Íslandi og Hetlandi hava sæð nógvar fuglar úr Asia ella Norðuramerika, so kundi tað eisini sagtans hent seg, at onkur var komin til Føroyar. Tá er bara at fara út at leita. Ein kann leita upp á nógvar mátar. Sjálvur gangi eg mest sum hvønn dag, tá veðrið loyvir tí, eina fasta rutu í Klaksvík, so eg komi framvið teimum bestu plássunum, sum tað hevur víst seg, at fuglarnir skoyta um. Bara í Klaksvík havi eg sæð 97 ymisk fuglasløg. So við at kanna sína egnu heimbygd regluliga, so er stórur kjansur at finna onkran sjáldsaman fugl, har sum tú býrt, eisini! V



*Mynd: Hans Eli Sivertsen*





4



**Bládúgvan er ein gamal búfuglur í Føroyum, men hon er eingin sjálvfylgja. Føroyski bládúgvurstovnurin er ein av síðstu upprunaligu bládúgvustovnum eftir í Norðurevropa. Hóast hetta, verður lítið og einki gjørt fyri at verja hann.**

**"**

## Blendingsdúgvan

Skilt verður ímillum upprunabládúgvur (*Columba livia livia*), og bládúgvur, sum hava verið tamar, men eru blivnar villar aftur, ella hava blandað seg við upprunadúgvur. Hesar kalla vit blendingar (*Columba livia domestica*).

Blendingsdúgvan hevur oftast ein búna, sum víkir frá tí upprunaliga búnanum (mynd 3). Tey flestu munnu kenna til blendingsdúgvurnar á Strøgnum í Keypmannahavn.

Summar blendingsdúgvur hava harafturat heilt annað høvuðskap enn upprunadúgvur. Húðfaldurin oman á nevinum er størri, og rundan um eygað er ein hvítur ringur. Hetta sæst ikki hjá upprunadúgvuni (mynd 4).

## Hóttanin móti bládúgvuni

Í 2005 varð ein reyðlisti skrivaður yvir hótt plantu- og fuglasløg í Føroyum. Bládúgvan er ein av teimum 54 fuglasløgunum á listanum. Hóttanin er tamdúgvur/brævdúgvur, sum til eina og hvørja tíð kunnu blanda seg við upprunadúgvurnar. Sambært heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvstovuni eru tilsamans 310 dúgvur í Føroyum (pr 11. mai, 2006): 210 í Tórshavn og 100 í Kollafirði. (viðmerkt er ikki hvat slag av dúgvum, talan er um, men vanliga eru tamar dúgvur av sama slagi sum bládúgvur.) Tamdúgvuhald hevur eisini verið arðastaðni í landinum fyri ikki so langt síðani. Og enn síggjast blendingsdúgvur í størri og minni mun yvir tað mesta av landinum.

Nólsoy er einasta oyggj í Føroyum, hvar forboð er móti tamdúgvuhaldi. Hetta forboð varð sett á grannastevnuni í 1994. Men ivasamt er, hvussu nógv hetta munar, tí bládúgvur dagliga ferðast yvir longri strekkir, so sum millum Nólsoy og Tórshavn.

## Týdning at verja tað, vit hava

Tá tosað verður um týdningin av einum djóraslagi, hugsa fólk ofta, hvussu nógv hetta og hatta kann seljast fyri. Hvussu nógvir pengar kunnu vinnast. Men hetta er ein stuttskygdur hugsanarháttur.

Sagt verður, at føroyska náttúran er so rein og rík. Men hon gerst skjótt fátøk, um vit ikki leggja okkum eftir at varðveita tey djórasløg, vit hava. Tað er trupult at rætta upp aftur, tá eitt djóraslag er útdeytt. V

**Ættin *Calliphoridea*: skinflugur**

Hetta er vanliga heiti á ættini.

**Slektin *Calliphora*: bláskinflugur**

Øll tey 7 sløgini í hesi slektini, sum eru funnin í Norðurlondum, eru meira ella minni blálig.

*Calliphora vicina*: vanlig skinfluga

52 % av øllum skinflugunum, ið vóru fangaðar í 2006, vóru hetta slagið, og tí er hetta tað mest vanliga slagið, og finst helst í øllum oyggjunum í Føroyum.

*Calliphora uralensis*: norðurskinfluga

Hetta slagið líkist nógv *C. vicina*, men í heimshøpi er landafrøðiliga útbreiðsluøkið nakað norðrari enn hjá hinum sløgunum.

*Calliphora vomitoria*: øsreyð skinfluga

Líkist teimum báðum áðurnevndu sløgunum, men hevur vakurt reytt skegg undir øsini.

**Slektin *Cynomya*: grønskinflugur**

Slektin fevnir um stórar skinflugur við skyggjandi grønum afturkroppi. Úr hesi slektini er bert hetta eina slagið funnið í Norðurlondum.

*Cynomya mortuorum*: skortgul skinfluga

Hetta slagið hevur gult "andlit".

**Slektin *Protophormia*: skygdar skinflugur**

Sløgini í hesi slektini hava sera skyggjandi fram- og afturkropp. Tey eru dimm á liti og eru ikki serliga loðin. 2 sløg úr hesi slektini eru funnin í Norðurlondum.

*Protophormia terraenovae*: glitskinfluga

Hetta er nógv tað blankasta og mest skyggjandi skinfluguslagið, ið vit hava.


**English Summary**

## The Faroese Blow-fly genera and species are named

The state of the Blow-flies in the Faroe Islands is currently being researched as a part of an on-going research study. As part of the outcome, Faroese names have been created for the 3 genera and 5 species, found until this date. The 5 species are: *Calliphora vicina Rob., Calliphora uralensis Vill., Calliphora vomitoria L., Protophormia terraenovae Rob., Cynomya mortuorum L..*


at fólk ymsastaðni úr landinum skuldu hjálpa til við innsavningini. Henda nýggja innsavningin endaði 31.12.2008.

Higartil er eitt nýtt skinfluguslag funnið, nevniliga *Calliphora vomitoria L.*, so nú eru tilsamans 5 sløg staðfest í Føroyum.

Burtur úr uppgerðini yvir tær meira enn 1900 skinflugurnar, sum higartil eru greindar, ber til at lesa ymiskt áhugavert. M.a. sær tað út til, at *Calliphora uralensis*, *Calliphora vomitoria* og *Cynomya mortuorum* eru sløg, ið bert finnast seint á vári, um summarið og tíðliga um heystið, meðan slagið *Calliphora vicina* er frammi alt árið, tvs. er funnið í øllum mánaðunum í árinum. Eisini er staðfest, at sínámillum prosentbýtið millum tey ymsu sløgini er sera ymiskt frá eini oyggj til aðra.
Prosentbýtið millum ymsu sløgini, við teimum fyrstu 1900 skinflugunum úr øllum landinum sum grundarlagi, er víst í Figur 1.

Karl A. Thomsen, ið hevur hjálpt til við innsavningini, helt tað vera spell, at tær innsavnaðu skinflugurnar bert høvdu latínsk og útlendsk nøvn. Hann helt eisini, at vit áttu at havt føroysk heiti til tær ymsu skinfluguslektirnar og –sløgini, ið eru funnin í Føroyum.
Tá tað ikki er nakað vísindafólk, sum beinleiðis fæst við sovorðið navnasmíð í Føroyum, fóru vit báðir sjálvir í holt við at finna hóskandi føroysk heiti til hendan dýrabólkin eftir leistinum um tvínevni. Vit settu okkum eisini fyri at nýta skipanarlagið, ið lýst er í frøðinevnalistanum Øktur føroyskur frøðinevnalisti hjá Jens-Kjeld Jensen og Marjun A. Simonsen, sum varð givin út í Fróðskaparriti 2004. Úrslitið sæst á tekningini omanfyri.


### Takk

Vit takka Marjun Arge Simonsen fyri málsligan stuðul og føroysku málnevndini fyri positivt svar í samband við eftirkannan av uppskotinum við nýggju heitunum.



**Hesi seinastu 20 árini er eitt fjølbroytt fuglalív sætt við Toftavatn. Væntandi verður eisini soleiðis í 2008. - Men hvussu leingi fer hetta at vara og í hvønn mun, um og tá ið Skálafjarðartunnil og risabygging undir Høganesi gerast veruleiki um nøkur ár?**

"

fólki verið alla tíðina við Toftavatn – og serliga meðan flytifuglurin var og vitjaði. Men heiðafuglurin fekk yvirhøvur frið. Partvís av alski og undran hjá fólki fyri ríka lívinum og ljóðinum á heiðini. Kanska hevði megnararbeiði hjá Sverra Paturssyni tíðliga í farnu øld eisini sína ávirkan á, at reiður og ungar fingu sín kravda frið at koma undan?

Fuglar, egg og ungar eru matur, ið ikki altíð var ov nógv av í farnari tíð. Undrunarvert, at Sverri fekk vent fólkahugsanini um hetta evni. Hugsi, at hesin stóri fuglavinur veruliga fekk framt eina hugburðsbroyting á hesum øki – langt áðrenn hetta nógv nýtta orð nú á døgum var uppfunnið!

## Nógv vitja vatnið

Hvussu er so títtleikin av fólkavitjan við Toftavatn nú á døgum? Koyrir tú eftir vegnum, síggjast hvønn dag nógv fólk, ið spáka sær ein túr eftir Mýrunum, sum vit kalla vegin her á leið. Hendan frástøðan er so mikið langt frá vatninum og lívinum har, at her kann avgjørt ikki vera talan um órógv av fuglalívi. Gongufeløg, fuglavinir og onnur spáka sær eisini onkuntíð framvið vatninum. Sá her í januar børn og ansarar teirra frá barnagarðinum eisini fara gongutúr har. So eru tað tey fólkini, ið fáast við at bøta um og fríðka. Brúgvin um vatnið og Bólið eru umvæld av Stíggi, ið hevur lagt nógva orku í hetta arbeiði, ið fremur trygdina hjá gongufólki og prýðir samstundis. Í fleiri ár hava Jógvan I. Olsen og Jónsvein Mikkelsen nýtt hópin av tíð og siglt hundraðtals bátalastir við grót og flag at umvæla hólmarnar á vatninum. Soleiðis at fuglurin lættari skal kunna búleikast í friði har. Eitt merkisvert og fyrimyndarligt arbeiði, fuglalívinum at frama.



*Nógvi lyngurin ger, at góðir møguleikar eru fyri fuglum at reiðrast – reiðrið er jú væl fjalt í lynginum. (Mynd: Dánjal Petur Højgaard)*

Góðveðursdagar á sumri fara familjur og vinarbólkar tíðum seinnapartstúrar. Vælumtókt støð eru tá t.d. Sandur Mikli, Sandur Lítli, Bøllunes, Borgin og onnur

Nøkur fara út í at vassa, meðan onnur svimja. Kanska onkur eingangs-grill verður tendrað onkustaðni við vatnið. Skótarnir eru eisini á ferð har. Eina vikuskiftis tjaldlegu – ella bara ein gongutúr. Viðhvørt flættað saman við einari sonevndari postarenning, har ávísar uppgávur at loysa liggja á avmerkturn støðum. Í fjør gingu úlvar og skótar stuðulsgongu kring vatnið til frama fyri nýggja skótahúsið, ið skal byggjast norðanvert >>

# Yvirlit yvir fuglar, sæddir við Toftavatn

## Frágreiðing:

ÁÐUR SÆDDIR:
*Studentaskúlin í Eysturoy, 1988-92*

VIT Á SKEIÐNUM:
*26. aug. 2006,*
*22.mai 2007*

Merkt við grønum:
støðufuglar, ið ikki flyta

| | | |
|---|---|---|
| fp | = | fyrrapart |
| sp | = | seinnapart |
| u | = | ungar |
| p | = | par |
| st | = | steggi |
| lj | = | ljósur |
| dim | = | dimmur |

STØÐUFUGLAR

FLYTIFUGLAR

| FUGLASLAG (f= faeroensis, føroyskt undirslag) | ÁÐUR SÆDDIR Vár | ÁÐUR SÆDDIR Heyst | VIT, Á SKEIÐNUM Vár ´07 | VIT, Á SKEIÐNUM Heyst ´06 | VIÐMERKINGAR (vár ´07) fp | VIÐMERKINGAR (vár ´07) sp |
|---|---|---|---|---|---|---|
| LÓMUR, *Gavia stellata* | | | • | • | 1,1p | |
| SVANUR, OKN, *Cygnus cygnus* | • | | | | | |
| KORNGÁS, *Anser albifrons* | | • | | | | |
| EKRUGÁS, *Anser fabalis* | | | | | | |
| BRANDGÁS, *Anser leucopsis* | • | | | | | |
| GRÁGÁS, *Anser anser* | • | | • | • | 2p+u, 10 | 4p+u, 20 |
| VILLDUNNA, *Anas platyrhynchos* | • | | • | | 1p | 1p |
| HØVUÐREYÐ ONT, *Aythya ferina* | • | | | | | |
| TRØLLONT, *Aythya fuligula* | • | | • | • | 2p, 8st | 5p, 5st |
| KRIKKONT, *Anas crecca* | • | | | | | |
| SPEGISLONT, *Melanitta fusca* | | | | | | |
| TOPPONT, *Mergus serrator* | • | | • | • | 3p | 5p |
| ÆÐA, *Somateria mollissima f.* | | | • | | 1bl, 2b | 1b |
| MÝRISNÍPA, *Gallinago gallinago f.* | • | | • | | 3p | |
| TJALDUR, *Heamatopus ostralegus* | • | | • | • | uml. 10 | uml. 10 |
| SVARTHÁLSA, *Charidris hiaticula* | • | | • | | 1 | |
| LÓGV, *Pluvialis apricaria* | • | | | | | |
| GRÁGRÆLINGUR, *Calidris maritima* | | | • | | 10 | 12 |
| FJALLMURRA, *Calidris alpina* | • | | • | | | 1p, 6 |
| SPÓGVI, *Numenius phaepus* | • | | • | | | 4 |
| TANGSPÓGVI, *Numenius arquata* | • | | • | | 1p | |
| STELKUR, *Tringa totanus* | | | • | | | 1 |
| TJALDURSGRÆLINGUR, *Arenaria interpres* | • | | | | | |
| KJÓGVI, *Stercorarius parasiticus* | | | • | | | 1lj, 1 dim |
| SKÚGVUR, *Stercorarius skua* | | • | • | | 1 | 2 |
| TERNA, *Sterna paradisaea* | • | | • | | 3 | 12 (nýkomnar) |
| FRANSATERNA, *Larus ridibundus* | • | | | | | |
| SKATUMÁSI, *Larus canus* | • | | • | | | 1 |
| RITA, *Rissa tridactyla* | • | | • | | | 1 |
| LIKKA, *Larus fuscus* | • | | • | • | uml. 30 | uml. 30 |
| SVARTBAKUR, *Larus marinus* | • | | • | • | 20 | uml. 20 |
| FISKIMÁSI, *Larus argentatus* | • | | • | • | 20 | 25 |
| VALMÁSI, *Larus hyperboreus* | • | | | | | |
| TÍTLINGUR, *Anthus pratensis* | • | | | | | |
| (FJØRU)GRÁTÍTLINGUR, *Anthus petrosus* | • | | • | | | 1 |
| ERLA KONGSDÓTTIR, *Motacilla alba* | • | | • | | | 1 |
| MÚSABRÓÐIR, *Troglodytes t. borealis* | • | | | | | |
| STEINSTÓLPA, *Oenanthe oenanthe* | • | | • | | 1 | 2 |
| KVØRKVEGGJA, *Turdus merula* | • | | | | | |
| KRÁKA, *Corvus corone* | • | • | • | • | 3 | 2 |
| BLÁDÚGVA, *Colomba livia* | | | • | | | 1 |
| LERKUR, *Alauda arvensis* | • | | | | | |
| LONASVALA, *Delichon urbica* | • | | • | | 3 | 1 |
| STARI, *Sturnus vulgaris f.* | • | | • | | | uml. 10 |
| GRÁSPURVUR, *Passer domesticus* | • | • | | | | |
| **Sædd fuglasløg tilsamans:** | 35 | 4 | 29 | 9 | | |

## Røkt av økinum

Ætlanir koma fram av og á um at gera gongugøtur kring Toftavatn. Fyri framman liggur gerð av gøtu framvið Løkinum og so kring norðara vatnið ("Lítlavatn"), ið hevur Brúnna sum eitt mark til syðra vatnið. Fyri náttúruáhugaði fólk ljóðar hetta sum søtur tónleikur í oyrunum; men her er at vóna, at gøtan verður løgd nakað niðanfrá sjálvum vatninum. Eg vildi skotið upp millum 50 og 100 metrar – soleiðis at teir fuglar, ið ferðast nær við vatnastrondina fáa sum mest møguligt av friði í reiðurtíðini. Ein fakliga góð »

**Stutt kann sigast, at nógv ymisk sløg av umhvørviseituri hava verið ávíst í havhesti, og serliga av teimum sløgum, sum eru fitiloysilig og seint niðurbrótilig.**

# Umhvørviseitur í havhesti

Maria Dam



Mynd: Jóan Petur Petersen

| Tal av fuglum | Aldursbólkur | Stað | Ár |
|---|---|---|---|
| 4 | ungar | | 1989 |
| 4 | egg | | 1989 |
| 25 | ungar | Nólsoy | 1997 |
| 15 | ungar | Vestmanna | 1997 |
| 25 | vaksnir og ungfuglar | Nólsoy | 1998 |
| 10 | vaksnir | Nólsoy | 1999 |
| 16 | ungfuglar | Viðareiði | 1999 |
| 10 | ungar | Viðareiði | 1999 |
| 20 | vaksnir og ungfuglar | Viðareiði | 1999 |
| 10 | egg | Skúvoy | 2000 |
| 15 | vaksnir | Viðareiði | 2003 |
| 9 | egg | Viðareiði | 2003 |
| 17 | vaksnir og ungfuglar | Nólsoy | 2003 |
| 20 | ungar | Vestmanna | 2005 |
| 10 | ungar | Vestmanna | 2008 |

**Talva 1**

*Havhestar sum eru kannaðir av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ella Umhvørvisstovuni.*

*Ungar eru floygdir ella eru um at verða tað. Ungfuglar eru floygdir men reiðrast ikki enn. Vaksnir reiðrast.*

## Bakstøði

Gjøgnum árini eru kanningar av umhvørviseituri í havhesti gjørdar við ójøvnum millumbilum. Heilsufrøðiliga Starvsstovan (HFS), og síðani 2007, Umhvørvisstovan (US), hevur staðið fyri kanningum av fuglum, sum víst í Talvu 1. Flestu kanningarúrslitini eru víst í Føroya Umhvørvi í Tølum 2003 og í frágreiðingini Indhold af miljøgifte i mallemukker med pilotstudie af kilde (sí www.us.fo). Harafturat eru havhestaegg og vaksnir havhestar og ungfuglur, helst ungar, frá 2000 og 2001 kannað av Universitetinum í Stokkhólmi í samstarvi við Deildina fyri Arbeiðs og Almannaheilsu. Áðrenn hesar kanningarnar í "nýggjari tíð" vórðu kanningar gjørdar av havhestaeggum í 1972. Tá vóru kanningar gjørdar av kyksilvuri, eisini metylkyksilvuri, PCB, DDE og dieldrin. Síðani hava kanningarnar verið víðkaðar til at umfata onnur evni av slagnum fitiloysilig persistent pesticid og ídnaðarkemikalii. Stutt kann sigast, at nógv ymisk sløg av umhvørviseituri hava verið ávíst í havhesti, og serliga av teimum sløgum, sum eru fitiloysilig og seint niðurbrótilig. Hesi fitiloysiligu og seint niðurbrótiligu evnir eru ein trupulleiki bæði í sjófugli og havsúgdjórum. Umframt tey áður nevndu PCB og pesticidum eru eisini onnur pesticid og dioksin umframt flammutálmandi evni, PBDE, fyri at nevna nøkur. Trupulleikin við hesum evninum er ikki nýggjur, og altjóða konventiónir eru virknar á økinum. M.a. Stokkhólm konventiónin, sum kom í gildi í 2004 og umfatar tað sonevnda "skitna dusinið" av ídnaðarkemikalium, pesticidum og evnum sum verða gjørd serliga við ruskbrenning. Konventiónin hevur eina mekanismu sum ger at nýggj evni kunnu verða umfatað av banni so við og við, sum vitan um tey verður avdúkað, og flammutálmandi evnini PBDE og PFOS evnini eru dømir um slík. Danmark hevur tikið við konventiónini, >>

Rapport nr. 37
fra Sjældenhedsudvalget

# Sjáldsamir fuglar í Føroyum 2005 og 2006

Søren Sørensen
Jens-Kjeld Jensen

## Indledning

Rapporten indeholder de sager, som Sjældenhedsudvalget (SU) har færdigbehandlet i perioden 2005 og 2006. I alt er der godkendt 95 sager. De omfatter 4 nye arter: Sædgås, Hvidøjet And, Duehøg og Østlig Turteldue; mens Sortbrun And, Taigapiber og Nordsanger alle er truffet for såvel anden gang som tredje gang. Ringnæbbet Måge blev fundet med 3. til 7. fund og heraf også en langtidsstationær fugl. Sortrygget Vipstjert, der blev fundet som ny ynglefugl i par med Hvid Vipstjert for første gang i 2004, blev fundet som sikker eller mulig ynglefugl hele tre steder i 2006.

Antallet af sager har været stærkt stigende, og det til trods for at listen over fugle, der skal forelægges SU, er blevet væsentlig indskrænket. Fra og med 2007 udgår yderligere seks, nemlig Gravand, Mandarinand, Knarand, Fløjlsand, Lille Kobbersneppe og Sortrygget Vipstjert.

Det er nu et stort antal af sagerne, der bliver dokumenteret ved foto af levende fugle, og det er også glædeligt, at naturinteresserede fortsat henvender sig f.eks. ved fund af døde fugle, som de ikke umiddelbart kender. En god beskrivelse eventuelt suppleret med en skitse/tegning vil dog ofte også kunne være tilstrækkelig dokumentation.

Ved hvert fund er nævnt: 1) årstal og dato; 2) lokalitet og ø; 3) antal, hvis der er flere end én; 4) evt. alder/dragt, køn, tilstand ved fundet; 5) observatør/finders navn er angivet en asterisk (*), evt. flere personer der var til stede ved opdagelsen. Følgende forkortelser er anvendt: ad. = adult (udfarvet, kønsmoden); imm. = immatur (ungfugl som har fældet sin første fjerdragt); juv. = juvenil (ungfugl i sin første fjerdragt); ringm. = ringmærket.

Efter artsnavnet er i parentes angivet: (1) antal fund og individer (adskilt ved en skråstreg) før 1950; (2) antal fund og individer 1950-2004; (3) antal fund og individer i 2005-2006. Antal fund kan afvige fra antal individer, idet flokke og par regnes som enkeltfund, mens f.eks. fem enkeltindivider samme dag regnes som fem fund. Der regnes også med flere fund, når et individ vender tilbage til samme lokalitet over flere år.

Sagsbehandlingen foretages fortsat af DOFs sjældenhedsudvalg efter aftale med Føroya Náttúrugripasavn (Naturhistorisk Museum i Tórshavn) og Føroya Fuglafrøðifelag. Indberetning af en sjældenhed består af oplysninger om omstændighederne for fundet, grundig beskrivelse af fuglen(e), samt eventuel anden dokumentation, f.eks. i form af foto eller båndoptagelse. Listen, som anfører de arter, der skal forelægges SU, kan fx findes på www.dof.dk under Sjældenhedsudvalget eller på www.netfugl.dk, se forsiden under "artikler".

Sidst i rapporten er anført sager, der ikke er godkendt. Indsendelse af rapporter til SU og alle henvendelser og forespørgsler kan ske til Søren Sørensen på nedennævnte adresse og bedst pr. e-mail eller til Silas K. K. Olofson, Klaksvik, på silasolofson@gmail.com.

Der skal rettes en tak til Marita Gulklett og Silas K. K. Olofson, som har gennemlæst og kommenteret rapporten. Først og fremmest skal der dog være en stor tak til observatører og indsendere, der har skabt det nødvendige grundlag for rapporten.

>>

English Summary

## Rare birds in the Faroe Islands in 2005 and 2006

In 2005 and 2006 the Danish Rarities Committee (Sjældenhedsudvalget/SU) accepted 95 records from the Faeroe Islands. Four species were new to the Faeroese list: Bean Goose *Anser fabalis*, Ferruginous Duck *Aythya nyroca*, Northern Goshawk *Accipiter gentilis* and Oriental Turtle Dove *Streptopelia orientalis*. Second as well as third records were Black Duck *Anas rubripes*, Olive-backed Pipit *Anthus hodgsoni* and Arctic Warbler *Phylloscopus borealis*.

The details given are 1) year and date, 2) locality and island, 3) number of birds if more than one, 4) sex, 5) other details, e.g. død = dead, ringm. = ringed, 6) observer(s) with finders marked by asterisks. Documentation by photo (foto), video, audiotape (bånd) or specimen (skind, død) is indicated. According to AERC standard the numbers in brackets following the species name refer to the total number of records and individuals (separated by a slash) before 1950, from 1950 to 2004, and from 2005/2006, respectively. V



# Rapport nr. 37
## fra Sjældenhedsudvalget

**Rørhøg** *Circus aeruginosus* Blotaheykur (3/3, 2/2, 1/1)

2006: 9.9-6.10, Millum Fjarða, Eysturoy, 1K, *Meinhard Hansen, Karl A. Thomsen, Hans Jørgen Nysted (foto).

Dette er det sjette fund, men kun de to seneste har været observationer fra felten dokumenteret med foto.

**Duehøg** *Accipiter gentilis* Høsnaheykur (0, 0/0, 1/1)

2005: 14.1, Klaksvík, Borðoy, 2K ♀ fanget i hønsegård senere død, *Jógvan Johannessen (foto).

En ny art for Færøerne. Den blev fanget i en hønsegård, taget på fersk gerning af den lokale kommunemand. Fuglen var kommet til skade og døde senere i fangenskab. Det må formodes, at den stammer fra Skandinavien, ligesom i øvrigt de i alt 15 shetlandske fund (Pennington et al. 2004). Arten er endu ikke fundet på Island.

**Spurvehøg** *Accipiter nisus* Spurvaheykur (1/1, 7/7, 3/3)

2006: 8., 9. og 12.10, Tvøroyri, Suðuroy, 1K ♀, *Hans Olsson, *Jesper Segergren m.fl. (foto). – 9.10, Hvalba, Suðuroy, 1K ♀, *Hans Olsson, *Jesper Segergren m.fl. – 12.10, Sumba, Suðuroy, 1K, *Hans Larsson, *Jesper Segergren m.fl.

Tre forskellige ungfugle observeret inden for få dage og sandsynligvis på træk fra Skandinavien. 10 ud af 11 fund er gjort i løbet af de sidste 50 år, og det må formodes, at arten nu er mere almindelig, end antallet af fund viser. Forekomsterne fordeler sig over hele året.

**Lærkefalk** *Falco subbuteo* Vákasmyril (0, 5/5, 1/1)

2004: ca. 23.6, Tórshavn, Streymoy, skadet senere aflivet, via Elspa Petersen (skind).

2005: 20.10, Miðvágur, Vágar, ad., *Rodmund á Kelduni.

De fleste er fundet om sommeren, og fuglen fra oktober er langt den seneste. Observatøren så muligvis fuglen i samme område allerede 26.9.

**Strandhjejle** *Pluvialis squatarola* Fjørulógv (2/-, 0/0, 1/1)

2006: 7. og 12.10, Sumba, Suðuroy, *Hans Larsson, *Jesper Segergren m.fl. (foto).

Dette nye færøske og længe ventede fund ligger som de to forrige i oktober/november. Det er en gæst fra primært Rusland/Sibirien, der på både Shetland og Island forekommer årligt især i det sene efterår.

**Dværgryle** *Calidris minuta* Dvørggrælingur (2/2, 2/3, 0/0)

2004: 14.-16.9, Sumba, Suðuroy, 2 juv., *Aksal Poulsen, Willy Mardal (foto).

De fire fund er alle fra august/september, og det svarer fint til den langt hyppigere forekomst på Shetland.

**Lille Kobbersneppe** *Limosa lapponica* Lónspógvi (8/8, 7/9, 1/1)

2006: 15.10, Kirkjubøur, Streymoy, *Hans Larsson m.fl.

Selv om der blot er ét godkendt fund på disse to år, er det besluttet, at arten udgår af SU-listen og derfor ikke mere skal forelægges til godkendelse. Baggrunden er, at forekomsten på både Island og Shetland viser, at arten må være meget underregistreret og i endnu højere grad end fx Strandhjejle, Dværgryle og Hvidklire. Der kræves opmærksomhed i forhold til Stor Kobbersneppe, og bestemmelsen er ikke vanskelig, men SU har set flere eksempler på, at Lille Kobbersneppe tilsyneladende kan være vanskelig at dokumentere skriftligt. De fleste fund på Færøerne er i perioden august-oktober, og desuden er den fundet overvintrende en enkelt gang. Til gengæld er der slet ikke fund fra maj-juli. Alle observationer bør selvfølgelig fortsat indrapporteres.

**Hvidklire** *Tringa nebularia* Hvítstelkur (0, 3/3, 1/1)

2005: 10.5, Sørvágur, Vágar, *Rodmund á Kelduni (foto).

Tre ud af de fire godkendte fund er fra maj, mens det fjerde er fra august. Både på Shetland og Island er efterårsforekomst mere dominerende.

**Thorshane** *Phalaropus fulicarius* Sundgrælingur (11/13, 2/2, 2/2)

2004: 8.9, Sumba, Suðuroy, juv. ringm., *Willy Mardal (foto).

2005: 10.10, Nólsoy havn, Nólsoy, *Kasper Thorup, *Jens-Kjeld Jensen.

2006: 21.5, Strond, Borðoy, ad. ♂, *Lars Larsson (foto).

Hermed tre nye fund, som alle ligger inden for artens trækperioder. Den blev genoptaget på SU-listen i 2002 efter en lang årrække uden kendte forekomster.

**Dværgmåge** *Larus minutus* Dvørgmási (8/8, 3/3, 2/2)

2006: 22.-31.8, Miðvágur, Vágar, 2K, *Rodmund á Kelduni (foto). – 14.-16.12, Sandavágur, Vágar, 1K, *Rodmund á Kelduni (foto).

Efter 50 år uden kendt forekomst var der 3 forårsfund af adulte fugle i 2003-2004 og her altså efterår- og vinterfund af yngre fugle i 2006.

**Sabinemåge** *Larus sabini* Ternumási (3/3, 3/3, 1/1)

2006: 6. og 7.7, Syðrugøta, Eysturoy, ad., *Lars Larsson, Karl A. Thomsen (foto).

De foregående tre forekomster i nyere tid har alle været observationer fra skib, men her altså en adult fugl rastende på strand.

**Ringnæbbet Måge** *Larus delawarensis* Sæðingur (0, 2/2, 5/5)

2005: 26.2-13.5, Sandágerði, Tórshavn, Streymoy, 2K, *Hans Eli Sivertsen (foto). – 15.4-31.12 og ind i 2006, Miðvágur og Vatnsoyrar, Vágar, 2K, *Rodmund á Kelduni, Janus Hansen, m.fl. (foto). – 3.5, Miðvágur, Vágar, 2K, *Rodmund á Kelduni (foto).

2006: - 2.1-24.11, Miðvágur og Vatnsoyrar, Vágar, 3K samme fra 2005, *Rodmund á Kelduni, Silas Olofson m.fl. (foto). - 18.2-4.3, Sandágerði, Tórshavn, Streymoy, 2K, *Hans Eli Sivertsen (foto). – 30.4, Kirkjubøur, Streymoy, 2K, *Rodmund á Kelduni, *Janus Hansen (foto).

En fugl har været på Vágar, ved Miðvágur eller Vatnsoyrar, fra i det mindste juni 2005 til november 2006. Den er derfor i sammenregningen regnet som ét fund. En fugl, der blev set ved Miðvágur allerede fra 15.4 2005, kan muligvis være et andet individ, men er dog her regnet som samme fugl. Omkring denne (eller en af disse fugle) har der også verseret diskussion, hvorvidt der var tale om en hybrid mellem Ringnæbbet Måge og Stormmåge, primært pga. meget (eller helt ) mørk iris; SU finder ikke, at denne mulighed er tilstrækkeligt dokumenteret. – De to første fund var 29.1 1981 og 4.7 1991, så der er tale om en ganske dramatisk ændring i denne periode, som i hvert fald til dels må skyldes en øget opmærksomhed i forlængelse af fundet 26.2 2005. Bemærkelsesværdigt er det også, at samtlige fugle er fundet som 2K, altså i første vinter- eller første sommerdragt, som ovenikøbet må være de vanskeligste dragter at få øje på; dog var en af fuglene altså stationær på Vágar til langt hen i 3. kalenderår til 2. vinterdragt. De færøske fund af ungfugle fra januar til maj må naturligt nok dreje sig om nyligt ankomne fugle, enten direkte fra Nordamerika eller nordtrækkende efter tidligere ankomst til fx Acorerne. Andre steder i Vesteuropa, hvor denne amerikaner har optrådt i stigende grad i løbet af de sidste 30 år, især i den sydligere del af Storbritannien, er aldersfordelingen meget bredere, bl.a. som udtryk for at mange fugle forbliver på denne side af Atlanten. Det forhold, at det overvejende er de unge fugle, der ankommer til Vesteuropa har tidligere været diskuteret ud fra funddata, og det færøske materiale støtter det altså til fulde. (Hoogendorn og Steinhaus 1990, K.M. Olsen 2003). Hverken på Shetland eller Island var der en speciel stigning i forekomsten i 2005 og 2006.

>>

**Sortkrage** *Corvus corone* Hjaltakráka (0, 2/2, 1/1)

2006: 27.7, Sumba, Suðuroy, fundet død, *Aksal Poulsen (foto).

Sandsynligvis denne fugl er set omkring Sumba af observatøren allerede fra oktober 2003, og det blev så endelig dokumenteret ved fundet af den døde fugl. De eneste tidligere fund er ligeledes fra Sumba-området, senest ved Akraberg 5.5 1984. Den yngler nærmest i Skotland, hvor den hybridiserer med Gråkrage, og er en fåtallig gæst på Shetland med stigende hyppighed. Modsat tidligere giver de fleste autoriteter i dag artsstatus til Sortkrage (Pennington et al. 2004).

**Stillits** *Carduelis carduelis* Fagurígða (0, 2/2, 1/1)

2005: 11.-26.10, Mykines bygd, Mykines, *Esbern í Eyðansstovu.

Det tredje fund med det første 27.10 1993 på havet nordvest for Færøerne og det andet 5.-10.5 1998 i Tvøroyri. På Shetland er den en meget fåtallig gæst i trækperioderne, hhv. omkring maj og oktober, mens det første fund på Island var samtidig, nemlig 17.10 2005. Siden er der meldt om yderligere 4 på Island i det sene efterår 2006 (Pétursson & Kolbeinsson / homepage for Birding Iceland).

**Karmindompap** *Carpodacus erythrinus* Roðaígða (0, 13/17, 1/2)

2006: 6.-7.10, Sumba, Suðuroy, 2, *Hans Larsson m.fl.

Der er nu fire fund om foråret, i maj/juni, og ti fund, i august-oktober, men det aktuelle er det hidtil seneste.

**Kernebider** *Coccothraustes coccothraustes* Kjarnbítur (1/1, 9/10, 2/2)

2006: 8.-13.5, Sørvágur, Vágar, ♀, *Lasse Sørensen, Turid Sørensen, Rodmund á Kelduni (foto). – 14.5, Vestmanna, Streymoy, ♀, *Rodmund á Kelduni (foto).

Alle de ti nye fund, fra 1986 og frem, har ligget inden for perioden ultimo april til primo juni. Både på Shetland og på Island har man set en tilsvarende kraftig stigning i forekomsten i disse år og med langt de fleste om foråret, men dog også nogle især i det sene efterår. Fuglene formodes at stamme fra bestande på kontinentet, men der mangler éntydige forklaringer på stigningen (Pétursson & Kolbeinsson / homepage for Birding Iceland, Pennington et al. 2004).

## Kategori C: Fund af arter hvis bestande stammer fra udsatte eller undslupne fugle

*Category C: Records relating to established feral breeding populations*

**Mandarinand** *Aix galericulata* Seglont (3/4, 9/14, 2/2)

2005: 21.4-12.5, Viðarlundin, Tórshavn, Streymoy, ad. ♂, *Kristian Meitil, Hans Eli Sivertsen m.fl. (foto).

2006: 18.6-27.7, Viðarlundin, Tórshavn, Streymoy, ad. ♂, Rodmund á Kelduni m.fl. (foto).

Frem til det seneste fund, hvor en han har oversomret i Tórshavn, har alle færøske fund drejet sig om hanner i april/maj. Fra og med 2007 skal den ikke mere forelægges SU til godkendelse.

## Kategori D: Mulige undslupne fangenskabsfugle

*Category D: Possible escapes*

5 **Snegås** *Anser caerulescens* Snjógás (1/1, 6/10, 3/3)

2005: 29.9-13.12, Sandsvatn, Sandoy, ad. hvid fase, *Hanna Joensen (foto).

2006: 30.4, Nykstjørn, Sandoy, ad. ♀hvid fase, *Janus Hansen, * Rodmund á Kelduni (foto). – 28.10-29.11, Sandur, Sandoy, ad. hvid fase, *Hanna Joensen, Jens-Kjeld Jensen, Bergur Olsen (foto).

Fuglen 30/4 var par med en formodet ♂ hybrid Grågås x Snegås. - Det er også et nyt fænomen, at arten optræder stationært med forsøg på overvintring sammen med Grågæs, og det er med stor sandsynlighed samme individ begge år.

## Forkastede sager

*Records not accepted*

**Sorthalset Lappedykker** *Podiceps nigricollis* 2005: 7.3, Sørvágsvatn.
**Spurvehøg** *Accipiter nisus* 1998: 15.11, Tvøroyri
**Lille Kobbersneppe** *Limosa lapponica* 2006: 13.8, Norðskáli.

hybrid **Stormmåge** x **Ringnæbbet Måge** *Larus canus* x *delawarensis* 2006: maj/juli, Vágar

**Kumliens Måge** *Larus glaucoides kumlieni* 2005: 19.2, Nólsoy.

**Rosenterne** *Sterna dougallii* 2005: 8.6, Sørvágur.

**Gul Sanger** *Dendroica petechia* 2006: 19.6, Tórshavn.

## Referencer


Boertmann, D., S. Sørensen og S. Pihl 1986: Sjældne fugle på Færøerne i årene 1982-85. - Dansk Orn. Foren. Tidsskr. 80: 121-130.

Fjeldså J. og J.-K. Jensen 1985: "Invasion" af Hvidvingede og Kumliens Måger på Nolsø på Færøerne. Dansk Orn. Fore. Tidsskr. 79: 103-106.

Hoogendoorn, W. og G. H. Steinhaus 1990: Nearctic gulls in the Western Palearctic, Dutch Birding 12: 109-164.

Olsen, K. M. 2003: Gulls of Europe, Asia and North America, Christopher Helm, London.

Pennington M., Osborn K., Harvey P., Riddington R., Okill D., Ellis P. og Heubeck M. 2004: The Birds of Shetland, Christopher Helm, London.

Sørensen, S. & J.-K. Jensen 2006: Sjældne fugle på Færøerne i 2003-2004. – Dansk Orn. Foren. Tidsskr. 100: 29-34.


## Kontakt


Søren Sørensen
Bratskovvej 1 B
DK-2720 Vanløse
Danmark
email: marie.soren@mail.tele.dk

Jens-Kjeld Jensen
FO-270 Nólsoy
Færøerne




Mynd: Janus Hansen

5

# Ternurnar verða taldar



Á Eiði komu einar 400 ternupisur undan í 2008, og var hetta nógv tað besta plássið í longri tíð. Tær gomlu bóru dúgliga ternumurtar og nebbasild til pisurnar. (Mynd: Rodmund á Kelduni)

Bergur Olsen
Sólveig Sørensen

## Fiskirannsóknarstovan samskipar

Í 2003 fór Fiskirannsóknarstovan undir at samskipa eina skráseting og teljing av ternum um alt landið. Ætlanin er at halda fram í nógv ár fyri at kanna, hvussu stovnurin broytist, og hvussu ternubølini flyta ymsa staðni í Føroyum. Vit vita um stórar broytingar, men tær eru ikki skrásettar.

## 59 teljarar og 132 ternubøli

Tað hevur gingist væl at fáa fólk til hesa teljing, hóast tey ikki fáa nakra samsýning fyri arbeiðið, og tað eru vit sera takksom fyri. Vit eru nú 59 teljarar, sum fylgja við, hvussu tað gongur ternunum í teimum 132 ternubølunum, sum vit vita um. Í 2008 vórðu ternurnar tó bert sæddar í 70 bølum. Fyrst í mai fáa allir teljarar eitt útfyllingarskema og eitt kort, sum teir senda inn aftur við upplýsingum, tá ið ternurnar eru farnar.

## Sjófuglurin sigur okkum, hvussu stendur til við fiskinum

Orsøkin, til at Fiskirannsóknarstovan er áhugað í ternum og øðrum sjófugli, er, at støðan hjá sjófuglinum sigur okkum nakað um, hvussu stendur til við fiskinum, tí sjófuglurin dugir væl at leita eftir fiski, og um hann onki finnur, so er lítið til.

## Pisurnar mugu fáa ternumurt ella nebbasild

Tann vaksna ternan kann klára seg við at eta ymiskt smátt æti, sum hon tekur í vatnskorpuni, men hetta fær hon ikki borið heim til pisurnar, tí hon kann bara bera ein fisk í nevinum í senn. Hon má tí finna størri fiskayngul sum ternumurt og nebbasild til pisurnar, og ger hon ikki tað, so doyggja tær í hungri. Ternan fær tó bara stoytt seg ein hálvan metur niður í sjógvin, so fiskurin má standa ovarlaga í sjónum, um hon skal fáa fatur á honum. Hetta ger, at ternan er sera viðkvom, og verður skjótt ávirkað, um føðin minkar. Er lítið til av føði, tá ið ternurnar koma, so verpa tær als ikki, men bíða til eitt annað ár. Hesi ringu árini sæst lítið til ternurnar í bølunum, tí tær gera skjótt av, og tá er torført at telja. Batna umstøðurnar, so kunnu tær verpa seinni út á summarið.

## Sera fáar ternupisur komnar undan seinastu árini

Ternustovnurin varð taldur á fyrsta sinni í 1981, og tá varð mett, at eini 11.800 pør áttu her. Síðani hava ongar teljingar verið fyrr enn í 2003. Vit vita tó, at frá 1984 til 1992 komu at kalla ongar ternupisur undan, og stovnurin minkaði, men í 1993 bar betur til, og tá vóru floygdar pisur at síggja nógva staðni. Í 1995 mettu vit, at bara 2.000 pør vóru eftir, men hetta var tó bert ein leyslig meting, uttan at ternurnar vórðu taldar. Støðan batnaði frá 1993, og í 2003 var talið komið upp á 7.600 pør, men síðani eru fáar pisur komnar undan, og stovnurin er minkaður, sum tað sæst á myndini, men hóast tað, so vitja ternurnar trúliga aftur aftan á ein langan túr suðuri á syðstu leiðum á Jørðini. V

*Teljingar av ternum og floygdum pisum um alt landið. Í 1981 vórðu pisur ikki taldar. 2005 var tað ringsta árið, og at kalla ongar pisur komu undan, men ternurnar støðgaðu sera stutta tíð í bølunum og vóru tí ringar at telja, so hetta úrslitið er í lægra lagi.*







Vit sóu fleiri grannljómarar



Svanar við Stóra Dímun í bakgrundini. Hesir sóust á einum øðrum túri til Suðuroyar í 2008.

í Sandavági og tey bæði at togast. Endin var, at erman, sum seyðamaðurin helt í, skrædnaði úr stakkinum, og søgnin sigur, at so stór var henda stakkarerma, at hon røkk til messuakul í Sandavágskirkju, og har er hon enn!

Komin fram við Tormansgjógv gingu vit nakað longur út, áðrenn vit so líðandi tóku okkum uppeftir undir Hjallabrúgv. Komin niðan á, settust vit eina løtu at eta matpakkan og annars at njóta tað sera vakra útsýnið yvir Víkar og norður ímóti Ritunøvini.

Tá hvíldin var liðug, gingu vit til Hviltkinnavatn og síðani rundan um vatnið. Vit høvdu hoyrt frammanundan, at skúgvurin skuldi fara sera illa við havhestinum har á staðnum. Og ímeðan vit gingu rundan um vatnið sást sjón fyri søgn, tí at har sóust rovini av sera nógvum havhestum – gott og væl tjúgu rov taldi onkur.

Eftir at hava gingið rundan um vatnið og dvølt har eina løtu, gingu vit oman frá aftur vatninum.

Vit gingu oman við Gullringsánni. Søgnin sigur, at áin hevur fingið hetta navn, tí at tað var her, tann navnframa Gæsa skuldi kasta gullringin hjá sær, ímeðan hon segði, at eins ósannlíkt tað var, at hon fekk ringin aftur, eins ósannlíkt var tað, at hon gjørdist fátøk. Men søgnin sigur eisini, at ein útróðrarmaður á floti vestanfyri nakað aftaná fekk stóran tosk við gullringinum í maganum! Og Gæsa – hvussu gekst so henni? Hon átti sambært søgnini stórar ognir í Suðurstreymoy, og hesum ognum vildi bispurin í Kirkjubø hava fatur á. Hann legði Gæsu undir at eta kjøt í føstu, tók ognir hennara og burturvísti henni til Gásadals at búgva.

Komin oman á slætt møttu vit Svenn, sum var komin til Tormanshús, nakað eftir at vit vóru farin haðani. Hann ætlaði sær niðan á Hviltkinnavatn og síðani niðan á Niðaraháls og haðani yvir á Miðgjógv, so hann kundi síggja niður á Víkar.

Vit gingu út á eggina, haðani vit sóu niður yvir Viðvík og út á Víkar – eitt sera vakurt útsýni.

Nøkur okkara gingu fram við eggini hagar, sum Gullringsáin rennur í Reipsá og síðani út av eggini – eisini eitt sera vakurt útsýni.

Hini vóru farin nakað undan okkum aft-ur ímóti Fjallavatni, men vit fingu tey aftur nakað longur heimi. Vit settust eina løtu við Reipsá og ótu tað seinasta av matpakkanum. Við ánna sóu vit eitt hvítkjógvapar.

Nú var vorðið stilli í veðrinum, og hetta gjørdi, at mýggjabitarnir flokkaðust um okkum í stórum tali. Vit gingu niðan við Reipsá – nøkur hildu nakað niðan frá fyri at sleppa undan mýggjabitunum, men líka lítið hjálpti tað. Onnur gingu niðan til Fjallavatn – Sven hevði fortalt teimum, at hann hevði sæð lóm við unga á vatninum, og komin til vatnið, sóu tey av okkum, sum høvdu lagt leiðina tann vegin, eisini lómin og ungan. Tá vit nærkaðust húsinum, kom eitt frískt lot eystaneftir, og beinanvegin hvurvu mýggja-bitarnir, og hetta var ein vælsignaður lætti!

Vit komu aftur til húsið um hálvgum seks tíðina. Eingin Anna var komin enn, so Bjarni og Jákup fóru ímóti henni. Teir møttu henni á hálvari leið og hjálptu síðani henni at bera viðførið til húsið. Anna hevði grýturætt við, so tá eplini vóru kókað, settust vit at eta. Omaná fingu vit rabarbugreyt, sum Anna eisini hevði havt við sær.

Eftir eina búrmáltíð varð tosað um at fara út at spáka, men hetta kom í drag, so vit sótu og prátaðu og spældu kort til langt út á kvøldið, áðrenn vit fóru til songar um hálvgum eitt tíðina.

Trongt var í húsinum, so Sven setti sær tjaldið upp uttanfyri – ikki tí, hann hevði væl kunna gist í húsinum eisini.

## Sunnudagin

Sunnumorgun vaknaðu vit um 9-10 tíðina, og eftir at hava etið morgunmat, ruddaðu vit upp, pakkaðu viðførið og fóru frá húsum um ellivu tíðina.

Vit høvdu tosað um at fara ein gongutúr, men hildu tað vera frægast at fáa viðføri í bilarnar fyrst. Vit gingu fram við vatninum - Bjarni fór tó á skák niðan frá húsinum í beinari kós til bil teirra, sum stóð við endan á "Brennivegnum". Komin nakað heim um sandin møttu vit fólki. Hetta vóru Petur Mortensen og Kári Davidsen frá Fuglafrøðifelagnum. Teir vóru á veg at merkja kjógva, og teir greiddi eitt sindur frá hesum og vístu okkum, hvussu fellan, teir høvdu við, virkaði.

Eftir at hava prátað eina løtu hildu vit áfram og komu til bilarnar klokkan gott og væl tólv.

Tey flestu høvdu hug at fara til hús, men Anna, Jutta, Dinna Alma og Bjarni fóru ein gongutúr – niðan í Vatnsdal omanfyri Bø, frætti eg seinni.

Vit onnur fóru til húsa – ein góður og áhugaverdur túrur var at enda komin.





Myndir: Hildur Nielsen

Hildur skrivaði upp, hvørji fuglasløg vit sóu á túrinum, og vóru tey hesi:
Stelkur, lógv, grágæs, steinstólpa, tjaldur, kjógvi (bæði ljósan og myrkan), spógvi, svartbakur, likka, havhestur, skúgvur, lómur við unga og ymisk sløg av ontum.

# Stuðla Fuglafrøðifelagnum

## við at gerast limur

Fuglafrøðifelagið er fyri teg, sum leggur í okkara náttúru og fuglalív. Felagið skipar fyri útferðum og tiltøkum, har vit læra fuglalívið at kenna. Tað er eisini alneyðugt at verja fuglalív og náttúru - og tí hava vit tørv á tínum stuðli.
Sum limur fært tú kunning um útferðir, tiltøk og felagið sjálvt. Eisini fært tú eitt ókeypis eintak av Veingjasuð. Tú kanst gerast limur við at senda navn og addressu til felagið (Les meira á síðu 3 í blaðnum).